## Johanna á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk:

# Trífaldir bestseljarar

**– Tá fyrsta bókin kom til landið, høvdu vit eina stóra móttøku. Men mitt í allari gleðini ringdi ein bókasølumaður í Havn, og vildi hava bøkur at selja. Vit hugdu uppá hvørja aðra og at bóka-stáplunum, sum stóðu har á gólvinum. Vit høvdu als ikki hugsað um, hvussu bøkurnar skuldu koma út um landið, greiða Jóhanna og Elisabeth flennandi frá**



Søgan endaði tó í øllum góðum; sølumaðurin koyrdi norður til Leirvíkar, og tær sendu bøkurnar yvirum við Ternuni. Allir bókahandlar fingu bøkurnar, og tríggjar vikur seinni máttu tær taka støðu til, um bókin skuldi endurprentast. Tað bleiv hon – ikki minni enn tvær ferðir.

Tvey'arin var somuleiðis bestseljari, og nú, eina góða viku fyri jól, vístu tølini frá bókasølunum, at nýggja bókin »Søtt og leskiligt« eisini var eina bátslongd framman fyri hinar bøkurnar.

So hóast tær aldri hava tikist við bókaútgávu áður, eru tær sostatt trífaldir bestseljarar.

### Gamal dreymur

– At geva eina kókibók út, var ein gamal dreymur, ið vit báðar høvdu gingið leingi við, greiðir Johanna frá. – Vit hava jú báðar fingst við mat leingi og hava drúgvar útbúgvingar innan matgerð.

Tá tær so hittust á Húsarhaldsskúlanum í 1994, byrjaðu tær í spølni at tosa um at gera álvara av dreyminum saman. Men ikki fyrr enn í 2003 tóku tær avgerð um, at nú skuldi tað vera.

Tær samdust skjótt um hvat tær ætlaðu sær. Tað skuldi vera ein kókibók við soltnum uppskriftum. Ráðvørurnar skuldu vera slíkar, sum vanligar føroyskar familjur eiga inni, soleiðis, at fólk úr Sumba og á Viðareiði eisini kundu gera matin. Og so skuldi maturin fylgja norðurlendsku tilmælunum um samanseting av feitti, proteinum og kolvætu.

– Vit ringdu so til Jastrid Gullaksen, sum er grafiskur designari og bóðu hana hjálpa okkum við uppseting, myndum o.t. Og tá hon nakrar dagar seinni vísti okkum, hvat hon ímyndaði sær, vóru vit púra seldar. Tað var júst so, vit hugsaðu okkum bókina, greiða tær báðar frá.

Jastrid sigur, at hon ikki var í iva, tá hon var biðin. – Eg helt tað vera ordiliga stuttligt at fara undir eina bók, tí tað hevði eg ikki roynt áður. Tað er øðrvísi enn at gera reklamur og tílíkt. Ein kókibók verður standandi á hillini í áravís, og verður aftur og aftur tikin fram, tí eru krøvini til kókibøkur heilt serlig, vísir Jastrid á.

### Roknistykki gekk upp

Uppskriftum høvdu tær nóg mikið av, men stóra arbeiðið var at rokna alt út, soleiðis at innihaldið samsvaraði við norðurlendsku tilmælini.

– Tað var eitt grúviligt manerér av teimum, minnist Jastrid. – Hvørjaferð tær broyttu eina uppskrift eitt lítið vet, mátti alt roknast umaftur, fyri at fáa tað at passa. So tær sótu í dagavís og roknaðu og roknaðu, greiðir hon smílandi frá.

– Og so, tá allar uppskriftirnar endiliga vóru lidnar, komu vit í tankar um, at vit ikki høvdu nakað til diabetikarar. Og so tóku vit allar kakurnar út aftur og gjørdu nýggjar diabetesuppskriftir. Vit bakaðu í dagavís og broyttu uppskriftirnar aftur og aftur, fyri at fáa kakurnar at smakka væl -og hvørjaferð vit broyttu, roknaðu vit uppá lívið fyri at lúka tilmælini, minnist Jóhanna flennandi.

### Drúgv rættlesing

Av tí at tær í 2003 aldri høvdu fingist við bókaútgávu áður, hugsaðu tær ikki so nógv um, hvussu tíðarkrevjandi tað fór at verða.

Eitt, sum serliga kom óvart á tær, var, hvussu langa tíð rættlesingin tók.

– Vit vildu hava, at tað skuldi vera gott, føroyskt mál, men tað mátti ikki vera torskilt. Og tað er altso ikki bara sum at siga tað, tí nógvir av hesum klóku málmonnunum, hava kanska ikki so nógv orð innan matgerð, vísir Elisabeth á.

– Tað vóru nógvir spurningar. Skal "kiwi" stavast við v ella w. Hvussu skal "lasagna" stavast á føroyskum? Og hvussu eitur "en knivspids" á røttum føroyskum máli? Vit hava vent hvørjum orði, og rættlesingin var uttan iva tann parturin, sum tók nógv longst tíð av øllum arbeiðnum, staðfestir Jóhanna.

Jastrid brýtur av og sigur, at hon at enda var noydd at steðga teimum. – Tær hildu alla tíðina, at tað kundi gerast eitt sindur betri. Men um bókin skuldi koma út til tíðina, so mátti endaligt punktum setast onkuntíð.

### Myndirnar – ein søga fyri seg

Tá tosið fellur á myndatøkuna, er aftur ein øgiligur látur. Tað var eitt sirkus, sum tær slett ikki høvdu gjørt sær tankar um áðrenn.

– Eg hevði teknað og planlagt hvørja mynd niður í minsta smálut. Eg hevði lænt eitt ótal av stellum og tallerkum, og hevði tráðspurt tær báðar um uppskriftirnar, um lit og støðd á mati og kakum, fyri at kunna planleggja, greiðir Jastrid frá. – Og tær flentu illa at mínum tekningum. Eg visti jú ikki hvussu maturin sá út. Eg hevði einki annað at halda meg til, enn teirra forkláringar, minnist hon.

Eftir var so bara at taka myndirnar. Fotografarnir Per á Hædd og Finnur Justinussen komu tí norður til Klakvíkar at taka myndir av matinum. Men tað var ikki bara-bara, tí í 2003 vóru ongar digitalar myndir, og tað var eingin undirsjóvartunnil. So teir tóku myndir og sendu tær yvirum við Ternuni so hvørt. Í Havn sat ein maður og framkallaði, og sendi myndirnar norður aftur til góðkenningar. Og maturin mátti goymast sum reyðagull í kuldaskápinum, um nú ein av myndunum var mislukkað.

– Ja, tað var munur á, nú vit gjørdu hesa seinastu bókina. Nú sóu vit myndirnar á telduni so hvørt, so tí var ikki neyðugt at skunda sær til Havnar. So nú fluttu teir bara norð íméðan myndatøkan fór fram, og tað var ikki so roksut, tað heila, flennir Jóhanna.

### Sóu málið – ikki vegin

Allar tríggjar eru á einum máli um, at tað er ótrúliga strævið at fáast við slíkar bókaútgávur. Tær hava tó havt eyguni fest á málið, og hava tí ikki hugsað so nógv um strævna vegin. Men sæð í bakspeglið hava tað verið ótalligar svøvnleysar nætur og nógv hart arbeiði.

– Tað hevur tó eisini verið ótrúliga stuttligt, og hóast tað mangan hevur staðið á, so er tað aldrin follið eitt øvugt orð ímillum okkum, sigur Jóhanna.

– Vit hóska eisini so væl saman og styðja hvørja aðra væl, leggur Elisabeth afturat.

Tá tær verða spurdar um hvat tað er, sum ger júst teirra bøkur til bestseljarar, gongur ein løta áðrenn svarið kemur.

– Vit hava jú lagt ótrúliga stóra orku í hesar bøkurnar. Og hóast tað eru fleiri føroyskar kókibøkur, so eru ongar, ið eru júst sum hesar. Og tær hava kanska manglað, heldur Jóhanna.

– Vit hava eisini fingið sera góðan kritikk fyri bæði uppskriftir, uppseting og myndir. So tað er kanska ikki av tilvild, at tær selja